# Føroya Sparikassi letur upp í Klaksvík

**Í dag letur nýggja deildin hjá Føroya Sparikassa upp í Bøgøtu í Klaksvík. Føroya Sparikassi hevur ongantíð áður havt deild í Norðoyggjum, men sambært leiðaranum á nýggju deildini eru vónirnar sera góðar.**

Í fyrstu atløgu fer nýggja deildin at halda til í leigaðum hølum í Bøgøtu 12, har fýra fólk dagliga fara at starvast. Men seinni í ár flytur Føroya Sparikassi virksemi sítt inn í húsaognina hjá handlinum EL-IN, ið Sparikassin hevur ognað sær.

### Norðoyggjar ein partur av meginøkinum

Føroya Sparikassi hevur nógv viðskiftafólk í Norðoyggjum, og fleiri norðoyingar eru eisini partaeigarar í peningastovninum. Eyðun Mørkøre, leiðari á nýggju deildini í Klaksvík, er sannførdur um, at tíðin nú er búgvin til at lata nýggju deildina upp:

– Vit hava nógv viðskiftafólk her í Klaksvík, og við nýggju deildini kunnu vit veita teimum eina enn betri tænastu enn áður. Nú Norðoyggjar eisini í næstum fara at verða ein partur av meginøkinum, fer meira ferð at vera á staðnum, og hesum øki ynskja vit í Føroya Sparikassa sjálvsagt at verða ein partur av. Tað er heldur ikki av tilvild, at vit lata deildina hjá okkum upp júst nú. Tað, at undirsjóvartunnilin letur upp, ger tað bara lættari hjá okkum.

### Vónirnar góðar

Hóast Norðoyatunnilin gevur fyritøkum í Norðoyggjum møguleikan at víðka um virksemi sítt hinumegin Leirvíksfjørð, ber tað tó eisini til, sum hjá Føroya Sparikassa, at fara norður um fjørðin at vinna sær kundar í norðoyggjum. Og sjálvt um Føroya Sparikassi enn er minsti bankin í Klaksvík, eru framtíðarvónirnar hjá leiðaranum sera góðar:

– Vit ætla at fáa nógv burtur úr okkara virksemi í Klaksvík. Í løtuni hava vit størru helvtina av øllum kundunum aðrastaðni í landinum, og hetta ætla vit eisini at stevna eftir her. Vit fara at miða eftir at fáa øll viðskiftafólk – bæði vinnu- og privatkundar, og allar verkætlanir eru vælkomnar til okkara.

Somuleiðis væntar Eyðun Mørkøre, at nýggja deildin hjá peningastovninum fer at koma øllum til gagns:

– Eg vóni, hinir bankarnir í Klaksvík fara at taka væl ímóti nýggju deildini. Tað er gott, spennandi og stuttligt við kapping. Og nú hon gerst størri, mugu bankarnir bara spenna seg enn meira út – og hesum fáa serliga viðskiftafólkini ágóðan av.

### Deildin í Klaksvík heldur øðrvísi

Deildin hjá Sparikassanum í Klaksvík er heldur øðrvísi á at líta enn flestu bankadeildir. T.d. er eingin kassi, har inn- og útgjaldingar verða avgreiddar, men heldur tykist hølið at bera á brá av eini opnari skrivstovu:

– Ætlanin er, at henda deildin heldur skal sýnast at vera eitt ráðgevingarhøli, har kundar kunnu koma í frið og náðum og fáa ráðgeving. Men hóast hetta, hevur deildin í Klaksvík allar tænasturnar, ein vanlig deild hjá Sparikassin hevur at bjóða.




*Samstundis, sum Sparikassin letur upp nýggju deildina í Klaksvík, fáa klaksvíkingar gleði av, at húsameklarafyritøkan INNI, ið er dóttirfelag hjá Sparikassanum, letur upp nýggja deild í sama bygningi. Tað verður Jón Simonsen, ið fyri tað mesta fer at taka sær av virkseminum hjá INNI í Klaksvík.*

## Hvat halda norðoyingar um nýggju deildina hjá Føroya Sparikassa?

**Í sambandi við, at Føroya Sparikassi letur deild upp í Klaksvík í dag, var hugnalig móttøka fríggjadagin 17. februar í KÍ-caféini. Á móttøkuni var ymiskt á skránni, m.a. tónleikur, røður og okkurt gott undir tonnina. Heilt fitt av fólki var til staðar, og vit loddaðu dýpið fyri at frætta, hvussu noyðoyingar fara at taka ímóti Føroya Sparikassa, og hvørjar vánir peningastovnurin hevur til virksemið í Klaksvík.**



**Sólrun Olsen, hárfríðkanarkvinna:**

Eg haldi, tað er frálíkt, at nýggjur peningastovnur kemur til Klaksvíkar. Tað ger einki, at vit hava eitt sindur meira at velja ímillum. Ikki tí, eg haldi bankarnir, ið longu eru her, røkja starvið væl, men tað ger einki, at teir fáa kapping – tað er bara stuttligt. Í løtuni nýti eg Føroya Banka, men av teirri orsøk, at sonur mín arbeiðir í Føroya Sparikassa, fari eg møguliga at flyta peningastovn, hvør veit.



**Steinbjørn Jacobsen, borgarstjóri í Klaksvík:**

Eg fari við vissu at ynskja teimum hjartaliga til lukku við deildini í Klaksvík. Tað, at nýggjur Sparikassi kemur til Klaksvíkar, boðar frá eini nýggjari tíð. Vit eru nú ein partur av meginøkinum, og at teir koma til Klaksvíkar til okkara, er ógvuliga jaligt. Vit hava í seinastuni lagt stóra orku í at verja teir almennu stovnarnar, ið vit hava her, so sjálvur haldi eg, landsmyndugleikarnir hava okkurt at læra av hesum. Tað hevur eisini alstóran týdning fyri kappingina í Klaksvík, at nýggjur banki kemur, og eg vænti, at hetta kemur bæði borgarunum og vinnulívinum til góðar. Eg rokni eisini við, at nógvir norðoyingar fara at nýta nýggja bankan. Øll fara sjálvsagt har, tey fáa mest burturúr.



**Karsten Hansen, fyrrverandi landsstýrismaður í fíggjarmálum:**

Eg haldi, tað bæði er jaligt og gagnligt fyri nærsamfelagið og fyri samlaða føroyska samfelagið, at Føroya Sparikassi kemur til Klaksvíkar. Kappingin fevnir jú so víða, og um norðoyingar ikki eru við í hesi kapping, verða vit eftirbátar, so tað er gott, at nýggjur peningastovnur kemur afturat í virkið øki. Eisini er hugburðurin hjá fólki broyttur ógvuliga nógv seinastu 2-3 árini – t.d. eru føroyingar farnir at keypa partabrøv o.t. sum ongantíð áður, og tað fer helst bara at vinda meir og meir upp á seg.

Tíðirnar eru nógv broyttar – undirsjóvartunnilin kemur og alheimssamfelagið er komið á kroppin á okkum, so hóast norðoyingar flest eru ógvuliga 'lokalir', ivist eg onga løtu í, at teir fara at taka væl ímóti nýggja peningastovninum.



**Eyðfinn Reyðberg, stjóri í Norðoya Sparikassa:**

Eg fari at bjóða Føroya Sparikassa vælkomnan til Klaksvíkar. Tað er altíð sunt og gott við kapping, og slíkari kapping eru vit í Norðoya Sparikassa heldur ikki bangin fyri. Og um nýggi Sparikassin kann føra við sær, at fleiri verkætlanir koma í gongd her í Klaksvík, er tað jú eisini ein vinningur fyri 'lokalsamfelagið'. So alt í alt er tað bara hugaligt, at vit gerast fleiri, ið kappast um kundarnar, og vit eru heldur ikki bangin fyri at missa okkara viðskiftafólk. Vit hava jú eisini boðað frá, at vit lata deild upp í Havn og Runavík í septembur mánaði, og tá meti eg, at vit megna at røkka um 75% av føroya fólki. So tað, at peningastovnarnir um alt landið økjast, er bert ein ein natúrlig menning.